


# Skjótt og bíligt av landinum - tá tað passar tær

Prísir úr:

| | | |
|---|---|---|
| Keypmannahavn | Upp í 27 ferðir um vikuna | 2020 |
| Billund | Upp í 7 ferðir um vikuna | 2046 |
| Aalborg | Upp í 2 ferðir um vikuna | 2068 |
| Rekjavík | Upp í 5 ferðir um vikuna | 1747 |
| London | 2 ferðir um vikuna | 2072 |
| Aberdeen | 2 ferðir um vikuna | 1938 |
| Hetland | 2 ferðir um vikuna | 2037 |
| Oslo | 2 ferðir um vikuna | 2033 |
| Stavanger | Upp í 2 ferðir um vikuna | 1832 |
| Stord | 1 ferð um vikuna | 1832 |
| Narsarsuaq | 2 ferðir um vikuna | 5874 |

... og tá eru skatturin og onnur avgjøld íroknað.

Prísirnir eru við keypi á atlantic.fo
Les meira á heimasíðuni.

www.sansir.fo

Bílegg feðaseðilin á tíni ferðaskrivstovu ella á www.atlantic.fo

Alpha Tel 352 900 | Faroe Travel Tel 312 600 | Flogfelag Føroya Tel 340 000 | Fonn Flog Tel 456 363

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum www.atlantic.fo





# Leið 410 koyrir aftur

**Í gjár frættist, at leið 410 brádliga ikki koyrdi longur millum Fuglafjørð og Gøtudal, tí bussfelagið hjá Andreassi Poulsen hevði lagt arbeiðið frá sær uttan ávaring. – Men nú eigur leið 410 at koyra sum vanligt, sigur Andras Jensen, samferðsluleiðari á Strandfaraskip Landsins**

LEIÐ 410
*Liv Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Andras Jensen, samferðsluleiðari á Strandfaraskip Landsins, sigur, at SL longu hevur gjørt avtalu við eitt annað bussfelag, og at bussfelagið hjá Andreassi Poulsen ikki sleppur at koyra leið 410 longur:

– Um eg skal vera púra erligur, veit eg ikki nágreiniliga, hvør trupulleikin var í gjár, men óivað eru tað pengar, ið eru atvoldin. Men málið er liðugt og avgreitt, og vit fara ikki at granska meira.

– Vit kunnu á ongan hátt góðtaka, at ein arbeiðstakari leggur arbeiðið frá sær á henda hátt, tí tað ávirkar viðskiftafólkini hjá okkum. Bussfelagið hjá Andreassi Poulsen koyrir tó enn á øðrum leiðum, men har hava vit ein sáttmála, so á teimum leiðunum verður eingin trupulleiki.

– Tað er sera umráðandi, at hetta ikki hendir aftur. Leið 410 eigur at koyra sum vanligt nú, sigur Andras Jensen.

Andreass Poulsen hevur leingi roynt at fingið sáttmála og pengar í lag, men tá eingin avtala lá fyri framman, valdi hann at gevast at koyra:

– Eg havi roynt at fingið allar avtalurnar í lag síðan leið 410 byrjaði at koyra. Strandfaraskip Landsins ætlaði at kroysta alla leiðina yvir á leið 400 uttan at tosa við leiðaran har, og tí valdi eg at gevast, og teir sendu meg til hús, sigur ein ónøgdur Andreass Poulsen.

# Norðurlendskur ungdómur savnast um listina í Føroyum

**Ung i Norden 2006 fer av bakkastokki beint aftan á skúlalok í summar. Tannáringar koma úr øllum Norðurlondum – frá Grønlandi til sámiska økið og Danmark...og øllum londunum har ímillum...**

UNG I NORDEN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tað er fyrstu ferð, at eitt sjálvstýrandi øki átekur sær at skipa fyri hesum tiltaki, og bæði Mentamálaráðið og Tórshavnar kommuna hava saman við Norðurlandahúsinum gjørt sítt til, at skipað verður fyri allarbestu umstøðum.

Fyrstu tvey kvøldini á stevnuni verða framførslur og listaframsýning sum luttakararnir hava fyrireikað "á heimavølli". Hesar eru almennar og verða í Auluni á Føroya Læraraskúla og á Stóraheyggi. Síðani verða smærri framførslur í Miðlahúsinum næstu tvey kvøldini.

At enda verður Norðurlandahúsið karmur um endasýningina sunnudagin 2. juli kl.17.00. Tá verða bæði pallframførslur, tónleikur, mótasýning, filmur, myndlistaframsýning... Norðurlandahúsið verður gjørt til "festivaløki", við fleiri pallum í høllini og klingruni. Til ber at keypa atgongumerki fyri 60 kr. í Norðurlandahúsinum og í Kunningarstovunum. Tó verður tað ókeypis atgongd á Læraraskúlanum og í Miðlahúsið fyrstu kvøldini.

Luttakararnir á stevnuni fara um dagarnar at vera í verksmiðjum undir leiðslu av eini 20 av føroya bestu ungu listafólkum. Tilsamans framleiða tey sýningina, sum óivað verður á fleiri enn einum tungumáli. Vár Berghamar Jacobsen, Ria Tórgarð og Páll Danielsen eru "framleiðarar".

Sjálv stevnan gongur fyri seg á Læraraskúlanum, gist verður á Sjómansskúlanum og eitt "vindeyga móti býnum", verður hvørt kvøld í Miðlahúsinum. At tiltakið verður sjónligt í býnum – soleiðis sum tað eigur at vera á altjóða festivalum – syrgja festivalfløgg fyri, og ikki minst tann ljósareyði Mini Cooper sum verður at síggja á vegnum nú í eina tíð.